Tvigiskjal 2.

LM-136/2020

Viðmerking viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (veiðigjaldslógin).

Uttan at fara út í smálutir kring sjálvan tekstin, í omanfyri nevnda uppskoti, vil Føroya Fiskimannafelag í fyrstu syftu vísa til felagsins yvirskipaðu hugsan í málinum.

Tað er eingin loyna, at Føroya Fiskimannafelag tekur sum heild ikki undir við tí slagnum av serligum skatti á vinnuligan fiskiskap, ið verður nevndur tilfeingisgjald ella veiðigjald.

Vit mæla heilt frá, at taka hesi heiti inn í føroyska lóggávu yvirhøvur.

Ein orsøk til okkara so greiðu støðu í málinum liggur í, at vit síggja hesar orðingar sum nakað ið ov lættliga letur upp fyri misbróki. Slíkar orðingar kunnu nevniliga virka sum eitt slag av tilgjørdum høvi ella undanførslu hjá bólkum, ið mest eru átøkir onkrum slag av nýyvirstætt, at leggjast á tann hart forvunna pening, ið verkafólk og fiskimenn fáa til høldar við stríð og strev.

Sum talandi dømi kann vísast á, at ein ávísur bólkur í nevndu nýyvirstætt krevur ikki minni enn 1.300 krónur um tíman, meðan verkafólk á landi mugu liva av einari tímaløn upp á 133 kr. Okkara hart arbeiðandi tímaløntu, fáa við øðrum orðum ein tíggjund av tí, ið marklætis njótarar í skammiliga væl vardari sosialari trygd kunnu súgva inn frá tíma- og avriksløntum gjøgnum skattir og avgjøld.

Vit undrast soleiðis enn einaferð, hvør eigur rættin til skattin — ella er hugsanin kanska at verkafólk og fiskimenn als ikki skulu eiga lut í vælferðini?

Fiskimannafelagið mælir avgjørt frá, at lata føroyingar verða býttar upp í klassar og kastur, har tey ið mugu arbeiða harðast fyri sína avmarkaðu løn, bara skulu finna seg í, at verða útnyttað sum um tey vóru lítið annað enn skaffidjór.

Sum er, fáa mong teirra ið liva sum verkafólk og fiskimenn, tíverri ikki lut í vælferðini. Tað kann tí heldur ikki vera rættur leistur, at taka pening inn í tann almenna raksturin á henda hátt, umvegis avgjøld á inntøkurnar hjá teimum, ið liva beinleiðis av tí ið havið gevur okkum. Vit vita nevniliga fyri vist, at tær inntøkurnar eru fongdar við óvissu og kunnu fyri hvørt einstakt fiskarí als ikki metast sum varandi.

Samstundis er tað samfelagsbúskaparliga vandamikið, at gera raksturin av einum bólgnandi almennum geira bundan av óvissum og misjøvnum inntøkum úr fiskivinnuni. Ein tílík praksis kann í veruleikanum samanberast við ein rúsevnistørv, har misnýtarar hava ómettiligan búskaparligan áhuga í, at við lóg leggja so nógv sum gjørligt, av samfelagsins samlaðu virðum og inntøkum at renna umvegis landskassan — har hesir somu eiga sjálsagdan fyrimun sum inngrónir umsitarar á heimavølli.

Hinvegin vil tað søma seg ólíka betur, og vísa seg meira at sær komið, at taka undir við at geva verkafólki og fiskimonnum nøkur fleiri rættindi og fyrimunir, so at tey eisini kunnu fáa veruligan lut í okkara felags vælferð.

Føroya Fiskimannafelag hevur ikki verður patur av hesi viðgerð, og metur hetta sum eitt álop á verkamannin.

Jan Højgaard

Føroya Fiskimannafelag